# ÁRSFRÁGREIÐING 2022

## Blákrossheimið




Blákrossheimið
DAT ung

Blái Krossur, mai 2023

**Blákrossheimið**
Við Pætursthús 2
FO-655 Nes

Telefon / 770 770
T-post / blakrossheimid@blakross.fo

Uppseting og print: Estra Vasti

# INNIHALDSYVIRLIT


Formæli ........ 4

Rakstur ........ 6

Vælkomin í viðgerð ........ 7

Hagtøl ........ 8

DAT ung ........ 10

Hvat er DAT? ........ 11

Dupult diagnosur og útgreining ........ 12

Samstarv ........ 14

Stovnurin góðkendur av myndugleikunum ........ 15

# FORMÆLI

Góði lesari!

Á Blákrossheiminum veita vit viðgerð til menniskju við rúsnýtsluórógv og teirra avvarðandi.

## Blákrossheimið

Hurðarnar á Blákrossheiminum lótu upp í 1984. Heimið var tá staðsett í Kongagøtu í Havn og virkaði sum avrúsingarstað, viðgerðarstovnur og herberg. Pláss var bara fyri fimm fólkum. Trý ár seinni, í 1987, flutti virksemið niðan í Lynggøtu, har umstøðurnar vóru betri. Pláss var tá fyri upp til 15 fólkum.

Í januar 2013 byrjaði byggingin av einum nýggjum Blákrossheimi á Nesi í Eysturoynni. Í september 2014, 30 ár eftir heimið byrjaði sítt virksemi, varð hetta arbeiðið liðugt, og eitt nýtt og snotiligt Blákrossheim kundi lata upp.

Høvuðsdeildin hjá Blákrossheiminum er á Nesi við einari deild í Havn, har okkara ambulanta viðgerð til bæði vaksin og ung heldur til.

## Heilsutrygd og hagtøl

Vit arbeiða í løtuni við at gera eina hagtalsskipan fyri virksemið á Blákrossheiminum. Hetta verður gjørt í samstarvi við Center for Rusmiddelforskning á lærda háskúlanum í Århus. Vit byrjaðu við árskiftið 2022-2023 at savna inn hagtøl við hesi hagtalsskipan. Ynskiligt hevði verið, at føroysku viðgerðarstovnarnir allir kundu brúkt somu skipan, so vit fáa samanberilig hagtøl um rúsnýtsluórógv í Føroyum, og á tann hátt fáa vit betri innlit í støðuna í Føroyum, so vit støðugt fáa ment viðgerðina.

Okkara mál er framhaldandi at varðveita og menna viðgerðartilboðið á Blákrossheiminum, har fakliga støðið er høgt og byggir á dagførda vitan á viðgerðarøkinum. Viðgerðin hevur seinastu árini verið bygd á grundhugsjónirnar í DAT-viðgerðarháttinum.

Heilsutrygd hevur sambært nýggjari lóggávu á økinum góðkent Blákrossheimið sum stovn, ið veitir rúsviðgerð.



## Útbúgving og samstarv

Blákrossheimið hevur seinastu árini skipað fyri útbúgvingum í DAT og PE-viðgerð, og skeiðini hava verið fullteknað. Í 2023 skipa vit fyri DAT-útbúgving, PE-skeiði („prolonged exposure“, viðgerð fyri posttraumatiskt stress) og KAT-skeiði við undirvísing í kognitivari viðgerð og háttalagi.
Vit hava seinastu árini lagt okkum eftir at útbúgva okkara egnu starvsfólk og at vera ein stovnur, sum bjóðar fakliga væl undirbygdar útbúgvingar og skeið. Vit hava árliga innanhýsis undirvísing fyri øllum starvsfólkunum, og starvsfólkini halda regluliga sína vitan við líka og menna hana gjøgnum skeið og útbúgvingar.



Gjøgnum langa tíð hava vit bygt upp eitt gott samstarv við myndugleikarnar, sum á ymiskan hátt varða av teimum ungu og øðrum borgarum, sum koma í viðgerð á Blákrossheiminum. Tvørfakliga samstarvið hevur sera stóran týdning fyri, at viðgerðargongdin hjá brúkaranum skal verða so góð sum gjørligt og eydnast so væl sum gjørligt.

## Rakstur og eftirlit

Í 2022 var játtanin til Blákrossheimið tkr. 9.383. Vit vilja framhaldandi arbeiða við at menna tær tænasturnar, sum Blákrossheimið veitir. Ein fortreyt fyri at menna tilboðini er, at politiski myndugleikin veitir neyðuga játtan til arbeiðið, og at lagt verður upp fyri, at økt virksemi eisini krevur eina økta játtan.

Tann 1. juli 2022 varð kunngerðin, „Bekendtgørelse for Færøerne om registrering af, underretning om og tilsyn med offentlige og private behandlingssteder", sett í gildi. Hon hevði við sær, at Landslæknin skuldi hava heilsufakligt og fyriskipanarligt eftirlit við øllum almennum og privatum viðgerðarstøðum. Tann 24. mai í ár var landslæknin á eftirlitsvitjan á Blákrossheiminum og gekk hetta væl. Nakrar tillagingar skulu gerast, men vit kunnu ótarnað halda fram við okkara virksemi, har vit bæði bjóða avrúsing og terapeutiska viðgerð.

## Leiðaraskifti

Hin 30. juni í ár fari eg frá sum leiðari á Blákrossheiminum. Eg havi arbeitt á Blákrossheiminum í 16 ár. Eg byrjaði í 2007 og arbeiddi sum deildarsjúkrarøktarfrøðingur fram til 2018, og seinastu fimm árini havi eg verið leiðari og trivist væl við tað. Eg komi at sakna bæði starvsfelagar og viðskiftafólk. Hetta hevur verið eitt sera gott arbeiðspláss, og Blái krossur Føroya hevur verið ein góður felagsskapur at arbeiða í. Starvsfólkini eru nærløgd og dugnalig og tað eru tey, sum gera, at Blákrossheimið kann veita eina dygdargóða viðgerð hvønn dag. Arbeiðið er í dag væl etablerað og hvílir í eini góðari legu.

Nevndin fyri Blákrossheimið hevur fyribils sett Leiv á Lakjuni, sálarviðgera, sum virkandi leiðara á Blákrossheiminum. Leiðarastarvið verður lýst leyst í fyrsta ársfjórðingi í 2024. Nevndin fyri heimið ynskir at brúka tíð at viðgera framtíðar møguleikar hjá Blákrossheiminum, herundir hvønn profil, ein komandi leiðari skal hava.

Við takksemi,

Jütta J. Olsen
*Leiðari*

# RAKSTUR

## Nevndin

Blákrossheimið er ein stovnur, sum fær almenna fígging til raksturin.

Leiðslan á Blákrossheiminum er skipað við nevnd og einum leiðara. Í nevndini sita:

- Hjalmar Hansen, formaður
- Dakko Petersen, næstformaður
- Elma Mikkelsen, skrivari
- Jütta J. Olsen, leiðari

## Starvsfólk

Á Blákrossheiminum eru 13,6 ársverk. Á Blákrossheiminum kunnu starvsfólkini í høvuðsheitum bólkast soleiðis:

- leiðari
- deildarsjúkrarøktarfrøðingur
- sálarfrøðingur
- sálarviðgeri
- heilsurøktari
- rúsevnisviðgeri
- familjuráðgevari
- og onnur starvsfólk

Eisini eru lækni og prestur fast knýttir at viðgerðini og vit fáa javnan ráðgeving frá psykiatara, men eru hesir ikki taldir við í uppgerðina av ársverk.

## Høvuðstøl úr játtanini og rakstrinum

| Rakstur, tkr. | **2022** | 2021 |
|---|---|---|
| Rakstrarjáttan | 9,383 | 9,283 |
| Rakstrarútreiðslur | 9,390 | 9,275 |
| Ársúrslit | -7 | 8 |

## Løn

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | **2022** |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir | 66% | 73% | 74% | 76% | 76% |
| Aðrar útr. | 34% | 27% | 26% | 24% | 24% |

Av samlaðu játtanini í 2022 vóru 76% brúkt til lønir, sum er sama býtið, sum var í 2021.

# VÆLKOMIN Í VIÐGERÐ

Viðgerð á Blákrossheiminum fer fram eftir tveimum sporum: Inni og úti.

Inniviðgerðin er tann siðbundna, har viðskiftafólk flyta inn á Blákrossheimið at búgva í tær vikurnar, sum viðgerðin varðar. Útiviðgerðin er ambulant og umfatar vikuliga bólkaundirvísing og í summum førum staksamtalur.

## Inniviðgerð

Tá ið ein persónur fer í inniviðgerð á Blákrossheiminum, fær hann ella hon rúm, fult og heilt at savna seg um sína viðgerð. Arbeiðsfriður fæst, tá ið sambandið verður kvett til umstøðurnar og umhvørvið, sum helt lív í teirra rúsnýtsluórógv.

## Avrúsing

Fyri tey, sum hava tørv á tí, kann inniviðgerðin byrja við medisinskari avrúsing. Lækni varðir av og leggur avrúsingina til rættis og tilgongdin sjálv verður leidd av honum og deildarsjúkrarøktarfrøðinginum.

## Bólkaviðgerð og staksamtalur

Á Blákrossheiminum fáa viðskiftafólk bæði sálarfrøðiliga bólkaviðgerð og staksamtalur. Viðgerðin byggir á DAT (dialektisk atferðarterapi), sum er ein vísindaliga undirbygdur viðgerðarháttur, sum hjálpir luttakarum at fáa betri sálarheilsu og at gera varðandi broytingar í tínum lívinum. Blákrossheimið veitir eisini viðgerð fyri post-traumatiskt stress. Les meira um DAT á síðu 10.

## Karmar

Serstakliga góðu umstøðurnar á heiminum sjálvum og vakra náttúran, tað er staðsett í, borga fyri arbeiðsfriði og trivnaði. Øll hava hvør sítt kamar og hentleikar eru til hugna og spæl. Venjingaramboð eru eisini tøk og náttúruøkið kring húsið er bæði vakurt og lætt atkomiligt.

## Samstarv

Tørvirnir hjá viðskiftafólkum á Blákrossheiminum kunnu vera samansettir. Samstarvað verður tí við eina røð av almennum og privatum stovnum, eitt nú Psykiatriska depilin, Almennaverkið, Barnavernd og tænastur hjá Bláa krossi Føroya, so sum Títt rúm og Ávegishúsið. Les meira um, hvussu Blákrossheimið samstarvar við onnur á síðu 14.

## Útiviðgerð

Ambulant útiviðgerð er ein smidlig viðgerð. Tørvur er ikki á, at seta fleiri vikur og mánaðir av eins og við inniviðgerðini, men einans nakrar tímar um vikuna. Persónurin, sum luttekur í útiviðgerð, fær raðfest og skipað sín gerandisdag eins og vanligt.

## Eftirviðgerð

Ambulanta útiviðgerðin hevur við sær, at borgarin ikki býr á Blákrossheiminum, men heldur møtir upp til førleikamennandi, terapeutiskar fundir – og kann síðani fara aftur til sín vanliga gerandisdag. Fyri summi byrjar útiviðgerðin sum eftirviðgerð eftir lokið uppihald á Blákrossheiminum.

## DAT-førleikabólkar

Allir útiviðgerðarbólkarnir byggja á DAT háttalagið. Hvørja viku verður undirvíst í einum nýggjum førleika, sum luttakarar, tá ið farið verður út í gerandisdagin, venja seg í. Bólkar eru fyri viðskiftafólk við rúsnýtsluórógv, kvinnur, avvarðandi og ung (les meira um DAT ung á síðu 10).

## Skeiðsvirksemi

Seinastu árini hevur Blákrossheimið lagt seg eftir, at skipa fyri terapeutiskum skeiðum. Í 2022 var eitt á skránni og tað var í „Prolonged Exposure“, stytt PE, sum er ein prógvgrundað viðgerð fyri trauma. Ár frammanundan hevur Blákrossheimið eisini skipað fyri skeiðum í DAT. Í 2023 verður skipað fyri skeiðum í DAT, PE og KAT (kognitivari atferðarterapi).

# HAGTØL

## Innskrivingar

*Tal av innskrivingum í inni- og útiviðgerð.*




*Kynslutfall frá 2018-2022.*




Ein ávís umskaring er millum viðskiftafólkini, sum eru eyðmerkt at vera innskrivað í ávíkavist inni- og útiviðgerð. Summi eru farin úr inniviðgerð í eftirviðgerð úti, meðan onnur kanska eru byrjað í útiviðgerð, men hava funnið útav at inniviðgerð hóskar betri til teirra tørv. Í báðum førum og líknandi øðrum er talan somu persónar umboðaðir í báðum bólkum.

## Kyn

*Kynsbýtið í ymisku viðgerðunum, Blákrossheimið veitir.*




Býtið millum kynini vísir, at meirilutin av teimum, ið leita sær hjálp í inniviðgerðini á Blákrossheiminum, eru menn. Lutfallið millum menn og kvinnur gerst eitt sindur javnari í samband við ambulantu útiviðgerðina, bæði fyri tilkomin og ung. Men hyggur tú einans eftir ambulantu útiviðgerðini fyri avvarðandi, so eru nógv fleiri kvinnur: 86% eru kvinnur og 14% eru menn.

Um øll, sum leitaðu sær viðgerð frá Blákrossheiminum í 2022 verða tald við, so er kynslutfallið tilsamans ávíkavist, 60% og 40%.

Hetta merkir, at lutfallið millum kynini er vorðið javnari við árunum. Hetta stendst møguliga av vaksandi raðfestingini, sum ambulanta útiviðgerðin hevur fingið. Eins og Blákrossheimið við ambulantu DAT ung viðgerðini hevur megnað at rokkið fleiri ungum enn áður, so hava vit sannlíkt eisini megnað at røkka fleiri kvinnum. Bólkurin fyri avvarðandi hevur tó stóra ávirkan á endaliga, lutvísa talið av kvinnum. Hetta eru ikki kvinnur, sum leita sær viðgerð fyri rúsnýtsluórógv, men tí tær eru avvarðandi hjá onkrum, sum stríðist við rúsnýtsluórógv.




## Aldur

Miðalaldurin á viðskiftafólki á Blákrossheiminum var í 2022 41 ár. Hetta merkir, at miðalaldurin enn einaferð er lækkaður samanborið við árið fyri. Soleiðis hevur gongdin verið síðani 2017.

*Miðalaldur, 2017–2022*




*Aldursbýti, ymiskar viðgerðir.*




### Rúsnýtsluórógv

Orðið „rúsnýtsluórógv" er eitt nýtt orð, sum er ment á Blákrossheiminum. Endamálið var at finna eitt orð, sum lýsti tað, sum annars verður kallað „rústrupulleiki", „alkoholtrupulleiki" ella „bundni". Orðið skuldi eisini vera kliniskt og lýsandi. Tað fangar praktiska veruleikan (at rúsnýtslan elvur til órógv í lívinum hjá tí, sum hevur rúsnýtsluórógv) og ikki bera brá av fordómunum, sum ofta verða knýttir at orðum, sum í samfelagnum verða brúktir um rúsnýtsluórógv („alkoholikari", „misnýtari"). Orðið kann eisini umfata tey avvarðandi.



# DAT UNG

DAT ung er eitt ambulant viðgerðartilboð til ung við rúsnýtsluórógv. Viðgerðin í DAT ung umfatar førleikavenjing í bólki saman við øðrum ungum og staksamtalur.

*Býtið millum ymisk rúsevni, DAT ung.*




DAT ung-tilboðið hevur nú nøkur ár á baki, og vit síggja, at við tíðini er eftirspurningurin øktur. Tað vísir seg so, at fyri at kunna hjálpa tí unga á bestan hátt, so er tað av alstórum týdningi, at stovnar og myndugleikar rundanum tann unga samstarva. Tá ið tey ungu ikki fáa ta viðkomandi og rættstundis hjálpina, sum teimum tørva, so kunnu avleiðingarnar verða oyðileggjandi fyri teirra framtíð. Tey kunnu eitt nú missa dýrabar ár, har lívið steðgar upp, og trupulleikar, sum hópa seg upp, kunnu hava avleiðingar í mun til m.a. skúlagongd, arbeiði, netverk og samleika. Avbjóðingarnar eru ofta samansettar, og tað finnast sjálvdan lættar loysnir, har bert ein fakpersónur kann loysa trupulleikan. DAT ung-tilboðið kann ikki altíð standa einsamalt sum viðgerð fyri tann unga. Eitt mál fyri 2023 er tískil, at miðvíst at røkja og styrkja um hetta samstarvið.

Umframt tvørfakliga samstarvið, so er tað eisini týdningarmikið, at tey, sum eru um tann unga í gerandisdegnum, verða drigin meira við í viðgerðina – serliga tá ið talan er um viðskiftafólk, sum eru undir 18 ár. Tá ið foreldur/verji verða drigin inn í viðgerðargongdina, hava tey størri møguleika fyri at stuðla og hjálpa tí unga á leiðini. Í DAT ung miðja vit tí eisini ímóti, at fáa tey avvarðandi drigin inn meira regluliga, m.a. við at javnan koma inn til samrøður, umframt at hava møguleika fyri at luttaka í avvarðandi bólkum, har tey eisini, sum tann ungi, kunnu tilogna sær viðkomandi førleikar fyri at betur kunna handfara sína støðu.

Tá ið hugt verður eftir, hvat slag av rúsandi evnum, fólk leita sær viðgerð fyri, so sæst ein týðiligur munur á yngri og eldri viðskiftafólki. Hjá eldra aldursbólkinum eru alkohol mest nýtta rúsandi evni. Tað er hinveg hash og onnur rúsandi evni, sum eru mest útbreidd millum tey ungu.

*Býtið millum ymisk rúsevni, inniviðgerð.*




*Aldursbýtið, DAT ung.*





# HVAT ER DAT?

DAT stendur fyri „dialektisk atferðarterapi“. Tað er ein viðurkendur og vísindaliga undirbygdur viðgerðarháttur, og viðgerðin á Blákrossheiminum byggir í stóran á DAT.

DAT er ein menning víðari av kognitivari atferðarterapi og varð serliga ment til fólk, sum høvdu borderline persónsleikaórógv. Men síðani er DAT ment nógv og er lagað til m.a. annað at hjálpa fólkum við rúsnýtsluórógv.

Í DAT viðgerðini á Blákrossheiminum luttaka viðskiftafólk bæði í førleikavenjing saman við øðrum og í staksamtalum við ein viðgerða. Førleikavenjingin byggir á sannføringina, at hóast øll gera tað, besta tey duga, so kunnu vit læra at gera tað betri. Menniskju koma í trupulleikar av ymiskum slagi, tá ið tey ikki hava nóg góðar førleikar at handfara støðuna, tey eru í. Førleikaøkini, undirvíst verður í, eru: Uppmerksemi (eisini kallað mindfulness), relatiónir, kenslur og kreppur.

Staksamtalurnar eru partur av somu tilgongd. Vikan verður gjøgnumgingin og hugt verður eftir truplum løtum og hvussu DAT kann ella hevur verið brúkt, at handfara tær. Samtalurnar byggja á eitt vikuskema, sum viðskiftafólk fylla út hvønn dag, har hendingar, kenslur og annað hvønn dag verður uppskrivað.

**Uppmerksemisførleikar:**
Við uppmerksemisførleikum fær ein størri innlit í tað, sum gongur fyri seg, bæði innan og uttan, her og nú, á ein ódømandi hátt.

**Relatiónsførleikar:**
Við relatiónsførleikum kann ein gera hjálpsamar broytingar í sínum sambandi við onnur menniskju.

**Kensluregulering:**
Við kensluregulering fær ein betri stýr á kenslunum og gerst ein meira effektivur í tí, viðkomandi følur og ger.

**Kreppuførleikar:**
Við kreppuførleikum kann ein læra, hvussu støður, sum eru serliga avbjóðandi kensluliga, kunnu handfarast. Eisini kallað „halt út-førleikar."

DATVARPIÐ

Sum partur av útivirkseminum framleiðir Blákrossheimið eitt podvarp, sum eitur Datvarpið. Datvarpið er ætlað at spæla ein stuðlandi leiklut hjá teimum, sum eru ella hava verið í DAT viðgerð á Blákrossheiminum. Hvør partar av Datvarpinum greiður frá einum einstøkum førleika á ein hátt, sum er lættur at skilja. Tað er Arni Zachariassen, viðgerði á Blákrossheiminum, sum er vertur í Datvarpinum.

Tað kann hoyrast her: www.blakrossheimid.fo/datvarp

# DUPULT DIAGNOSUR OG ÚTGREINING



Nógv av teimum, sum stríðast við rúsnýtsluórógv, hava eisini aðrar sinnisligar trupulleikar. Hetta kann vera angist ella tunglyndi, autisma ella ADHD, persónsleikaórógv ella PTSD, ella tyngri diagnosur, eins og skizofroni ella bipolar. Menniskju við dupult diagnosum verða onkuntíð søgd at vera „dupultbyrðað", tí teirra samansettu avbjóðingar kunnu bæði merkja, at gerandisdagurin gerst tilsvarandi truplari at skipað og at tey myndaliga detta niður ímillum stólarnar í almennu skipanini. Tey hava sostatt størri tørv á hjálp enn onnur, samstundis sum tey oftari enn onnur ikki fáa hjálpina, tey hava tørv á.

Seinastu árini hava vit á Blákrossheiminum í ljósinum av hesum lagt størri dent á sinnisliga útgreining og samstarv við Psykiatriska depilin. Øll, sum koma í viðgerð, verða spurd um møguligar psykiatriskar diagnosur og heilivág. Regluligir fundir eru við Psykiatriska depilin um tey viðskiftafólk, sum hava tørv á tí. Og er illgruni um sinnisligar trupulleikar, so kunnu sálarfrøðingarnir á Blákrossheiminum skipa fyri útgreining.

Hesi eru amboðini, útgreinað verður við:

- The Mini International Neuropsychiatric Interview (MINI), tá ið ein yvirskipað mynd skal gerast av sinnisligu støðuni hjá viðskiftafólkinum.
- ASRS v. 1.1 (Adult ADHD Self-Report Scale) og DIVA 2.0 (Diagnostich Interview voor ADHD), tá ið illgruni er um uppmerksemistrupulleikar.
- PTSD-8 (A Short PTSD Inventory), PSSI (PTSD Symptom Scale Interview), og PCL-5 (PTSD Check List), tá ið illgruni er um posttraumatiskar trupulleikar.
- BDI-II (Beck Depression Inventory), tá ið illgruni er um tunglyndi.
- MMSE (Mini-mental State Examination), tá ið illgruni er um demens og trupulleikar við minninum.
- SCID-II (Structured Clinical Interview for DSM), tá ið illgruni er um persónsleikaórógv.

Vísur útgreiningin, at tørvur er á tvørfakligum inntrivi, setur Blákrossheimið seg í samband við Psykiatriska depilin.




**Lýsingarátak**
Blákrossheimið almannakunngjørdi í 2021 eitt lýsingarátak, sum varð kallað „Tor at seta orð á“. Við tveimum lýsingafilmum, heimasíðu, faldarum, plakatum og skíggjalýsingum varð roynt at seta gongd í orðaskiftið um rúsnýtsluórógv. Í maimánaði í 2022 vórðu lýsingar aftur settar í miðlarnar.

# SAMSTARV

Blákrossheimið samstarvar við fleiri ymiskar stovnar og felagsskapir, alt eftir tørvunum, viðskiftafólk hava. Samstarvað verður við eina røð av almennum og privatum stovnum, eitt nú Psykiatriska depilin, Almennaverkið, Barnavernd og tænastur hjá Bláa krossi Føroya, so sum Títt rúm og Ávegishúsið.

## Títt Rúm

Títt Rúm er eitt fyribyrgjandi viðgerðartilboð undir Bláa Krossi Føroya, ið byrjaði í 2012 undir heitinum Øll hava rætt til góð barnaár. Á sumri 2021 varð navnið broytt til Títt Rúm.

Títt Rúm er eitt tilboð til øll í aldrinum 0-35 ár, sum hava ella hava havt rúsbundin foreldur. Títt Rúm bjóðar ókeypis bólkar, samrøður og ráðgeving. Bólkar eru til øll í aldrinum 9-35 ár, og teir verða deildir upp í barna-, tannáringa-, ungdóms og vaksinbólkar. Barnafokuseraðar foreldrasamrøður eru altíð partur av bólkatilboðnum til børn og tannáringar. Eisini foreldur, hvørs børn ikki ganga í bólki, kunnu fáa samrøður og ráðgeving hjá Títt Rúm.

Tað nýggjasta tilboðið hjá Títt Rúm er barsilsbólkur. Hetta eru bólkar, sum eru til foreldur í barnsburðarfarloyvi. Talan er um ókeypis bólk til tey, sum hava ella hava havt rúsbundin foreldur. Harumframt er bólkurin til tey, sum hava ein maka, ið rúsar seg á ein hátt, sum ger, at tey gerast stúrin um familjulívið.

Í Títt Rúm hava starvsfólkini ymiskar fakligar bakgrundir – í námsfrøði, familjuterapi, heilsufrøði og sálarfrøði.

*Les meira á www.títtrúm.fo.*

## Ávegishúsið

Ávegishúsið er eitt rúsfrítt bútilboð fyri menniskjum, sum tørva stuðul at halda seg rúsfrí og at menna sína tilveru til størri sjálvbjargni. Endamálið við uppihaldinum í Ávegishúsinum er, at tann einstakið fær ein góðan og tryggan bústað, so tilveran gerst meira støðug. Málið er altíð at menna tann einstaka til eitt sjálvstøðugt lív í samfelagnum.

Ein gerandisdagur í Ávegishúsinum verður skipaður saman við hvørjum einstøkum búfólki. Ein virkisætlan verður gjørd í samráði við hvørt einstakt búfólk við støði í tí, sum persónurin megnar. Virkisætlanin verður gjørd stutt eftir, at persónurin er fluttur inn í Ávegishúsið. Endamálið við virkisætlanini er, at tann einstaki ger eina framtíðarætlan í samband við skúla, útbúgving, arbeiði, frítíð, bústað og sosial viðurskifti og sambond við onnur. Búfólkið fær vegleiðing um at leita sær hjálp hjá lækna, at handfara heilivág og at skipa hesi viðurskiftini. Samstarvað verður tætt við Almannaverkið og ofta er ein sosialráðgevi við, tá ið virkisætlan verður gjørd.

Tá viðurskiftini hjá einum búfólki hava lagað seg soleiðis, at viðkomandi megnar at liva eitt sjálvstøðugt lív, so verður arbeitt fyri, at viðkomandi finnur ein varandi bústað, sum viðkomandi megnar at halda og røkja.





# STOVNURIN GÓÐKENDUR AV MYNDUGLEIKUNUM

Heilsutrygd góðkendi í 2022 Blákrossheimið sum viðgerðarstovn, ið veitur rúsviðgerð.

Henda góðkenning hevur heimild í løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 2019, „Um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð“, umframt kunngerð nr. 75 frá 29. mai 2020. Góðkenningin varð gjørd við støði í umsókn, sum varð móttikin 29. desember, 2020, um góðkenning av viðgerðarstovninum. Heilsutrygd var á eftirlitsvitjan t. 1. juni 2021 á Blákrossheimið, umframt á eini styttri endurvitjan t. 25. august 2021.

Avgerðin byggir á niðurstøðurnar hjá eftirlitinum, ið yvirskipað kunna býtast í tríggjar kategoriir: Álvarsamar átalur (her verður virksemi antin steðga ella verða skjótar ábøtur kravdar fyri, at tað skal góðkennast og halda áfram), Menningarpunkt (her skal ein sannførandi ætlan leggjast fyri at betra um viðurskiftini, um góðkenning skal varðveitast við næsta eftirlit um 5 ár) og Uppmerksemispunkt (ið metast sum ein betring av virkseminum, tó uttan at hetta hevur beinleiðis ávirkan á góðkenningina).

Heilsutrygd hevði einki at siga um Blákrossheimið í tveimum teimum fyrstu kategoriunum. Fimm uppmerksmispunkt vórðu nevnd.



Blákrossheimið
DAT ung